Fyrstu stigini til bruttoskatt:

Beinleiðis skatturin skal niður

Umleggingin av skattinum førir upp á longri sikt við sær, at beinleiðis skattatrýstið verður minni. Men tíðirnar eru tó ikki til skattalækking nú, og tí verður samstundis útskrivaður eykaskattur, sigur landsstýrið

Á tingfundi fríggjadagin legði landsstýrið ikki færri enn 13 mál fyri tingið, sum øll eru partur í fíggjarlógaruppskotinum, sum tingmenn fara at viðgera í dag.

Fleiri av málunum hava við skatt at gera. Landsstýrið hevur boðað frá, at uppskotini eru ein liður í broytingini í skattinum til eina bruttoskattaskipan, har skattafrádráttir fella burtur so við og við. Í hesum førinum er talan um at seta reglurnar um persónsfrádrátt, løntakarafrádrátt og ferðafrádrátt úr gildi. Eisini skýtur landsstýrið upp, at broyta rentufrádráttin frá 42 og niður í 40 prosent.

Størri botnfrádrátt

Ístaðin fyri teir ymisku frádráttirnar er ætlanin at broyta skattastigan á tann hátt, at landsskattur verður ikki roknaður av skattskyldugari inntøku undir 22.500 krónur. Hetta samsvarar við, at øll fáa ein frádrátt í skattskyldugu inntøkuni upp á 22.500 krónur.

Í kommunuskatinum skýtur landsstýrið upp, at eingin kommunuskattur skal roknast av inntøkum undir 12.000 krónur. Orsøkin til, at munur er á botnfrádráttinum hjá landi og kommunu er, at komm.unurnar ikki skulu bera ein lutfalsliga ov stóran part av skattaumleggingini.

Landsstýrið sigur, at ætlanin við umleggingini av persónsskattinum er uppá longri sikt eisini at fáa beinleiðis skattatrýstið at lækka. Sagt verður at umleggingin hevur skattalætta fyri flest allar løntakarar við sær, men tá hugsað verður um vánaligu tíðirnar, eru ikki ráð til skattalættar í dag. Tí verður samstundis útskrivaður ein eyaskattur til landskassan fyri allar inntøkur hægri enn 140.000 krónur.

Eykaskattur

Eykaskatturin skal galda fyri næsta ár. Hann verður 3 prosent av skattskyldugari inntøku frá 140.000 til 220.000 krónur. 4 prosent av inntøkunum millum 220.000 og 300.000 krónur, og 5,5 prosent av inntøkum oman fyri 300.000 krónur.

46 milliónir í eykaskatti

Eftir broytingunum, sum landsstýrið skýtur upp, fáa inntøkrunar undir 140.000 krónur minni skatt. Hinvegin fáa allar inntøkur omanfyri meira at gjalda í skatti. Landsstýrið metir, at vanligi inntøkuskatturin fer at geva landskassanum 722 milliónir. Eykaskatturin fer at geva 46 milliónir. Í hesum útrokningum hevur landsstýrið eisini roknað við, at skattainntøkan minkar næsta ár við 11 prosentum.

tór.-

Fólkapensionistar skattskyldugir

-men av grundupphæddini skal tó ikki gjaldast skattur

Eftir broytingunum, sum landsstýrið hevur skotið upp, verða allar almannaveitingar roknaðar sum skattskyldug inntøka. Eisini fólkapensionistar koma nú undir skipanina við nýggja botnfrádráttinum. Men haraftrat verður ein serligur frádráttur loyvdur pensionistum upp á 8.300 krónur frá landsskattinum fyri stakar persónar og 5.500 krónur fyri giftar persónar.

Á hendan hátt kemur ein fókapensionistur ikki at rinda skatt av grundupphæddini. Hinvegin verður skatturin eitt sindur hægri av inntøkuni, sum liggur oman fyri grundupphæddina.

tór.-

Partafelagsskatturin er minkaður burtur í einki

Síðani 1987 er partafelagsskatturin minkaður úr 116 og niður í 19 milliónir. Nú fer landsstýrið at broyta skattaskipanina viðvíkjandi partafeløgunum

Landsstýrið hevur skotið upp at lækka sjálvan partafelagsskattin úr 49 prosentum og niður í 22 prosent. Samstundis verður skotið upp, at skipanina við rakstrar- og íløgugrunni verður broytt. Somuleiðis verður skotið upp at vinningsbýtisskatturin verður settur til 35 prosent.

Landsstýrið heldur, at tíðin er farin frá skipanini við íløgugrunni har umleið 160 milliónir standa í løtuni. Skipanin førir við sær, at vinnurekandi heldur velja at gera nýíløgur enn umvælingar. Hetta er óheppi, heldur landsstýrið, tí nýíløgurnar eru oftast keyptar úr útlondum, meðan umvælingar er íløga, sum gevur arbeiði í Føroyum.

Lækka skattin

Í viðmerkingunum til uppskotið sigur landsstýrið millum annað, at vit hava, ikki minst í dag, brúk fyri fyritøkum og feløgum, sum eru kappingarfør, sum vinna pening, og sum hava stóran eginpening, sum er fortreytin fyir øktari framleiðslu, tryggum viðurskiftum og stabilum arbeiðsplássum. Fyri at betra um hesar umstøður heldur landsstýrið tað vera neyðugt at lækka partafelags- og felagsskattin, sum fleiri av okkar grannalondum hava gjørt.

Landsstýrið heldur, at tíðin til tílíkar broytingar er júst hon rætta, tí land og kommunur fáa lítlan og ongan partafelags- og felagsskatt inn sum er. Víst verður á, at hesin skattur er minkaður nógv seinastu árini. Í 1987 komu inn 116 milliónir, og í ár verður mett, at tað fara ikki fleiri enn 19 milliónir at koma inn í partafelags- og felagsskatti.

So nógv er felagsskatturin minkaður eftir so fáum árum

Størri skattainntøka

Landsstýrið heldur, at umleggingin av felagsskattinum fer at gera, at feløg í útheiminum fara at gera íløgur í Føroyum, so vit á hendan hátt fáa økt virksemi og harvið eisini fleiri nýggj arbeiðspláss. Tí heldur landsstǽrið, at skattabroytingin í hesum førinum kann geva møguleika fyri øktum skattainntøkum til land og kommunur.

tór.-

Skattaár 1.000 kr.	1987	1988	1989	1990	1991 (fyribils)	1992 (mett)
sk. inntøka:	236.790	269.751	211.407	166.337		
skattur	116.002	148.358	103.573	81.502	33.000	19.000

Umrøðan byrjar fyrrapartin



Tingformaðurin fær úr at gera at stýra drúgva orðaskiftinum. Mynd: Jan

Klokkan 10 í morgun byrjar tingið viðgerðina av fíggjarlógaruppskotinum hjá landsstýrinum. Hetta er onnur framløgan av fíggjarlógaruppskoti fyri 1993. Lítið er at ivast í, at flestu tingmenn fara at nýta hetta høvi at koma framat mikrofonini, so orðaskiftið verður drúgvt.